# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**




Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Oyggjablaðið í næstu viku: Norðoyggjar

## Hesaferð: Oyndarfjørður

**Mikudagin í farnu viku vitjaði Oyggjablaðið í Oyndarfirði. Her er eitt úrslit av vitjan okkara:**

**Síða 18:** Fólkatalið minkar

**Síða 19:** Regntungt

**Síða 20-21:** Eivind handlað í 69 ár

**Síða 22-23:** Marjun arbeiðir í fiski

**Síða 24-25:** Barnagarðurin í myndum

**Síða 26-27:** Sigmund spælir urgu

**Síða 28-29:** Hans Jacob trívist í kuldan

**Síða 30-32:** Borghild úr Havn trívist á bygd

**FRAMTÍÐ**



*Fólkatalið í Oyndarfirði hevur verið lækkandi tey seinnu árini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 6 undir 200

Eins og so manga aðrastaðni hevur Oyndarfjørður eisini merkt til fráflyting tey seinnu árini.

Tað eru tó undantøk, eins og víst verður á aðrastaðni í blaðnum í dag, har fólk beinleiðis eru flutt higar úr høvuðsstaðnum. Men gongdin og hagtølini vísa greitt, at fólkatalið er í minking

Sambært Hagstovuni var tað í tveimum førum tætt við, at fólkatalið fór upp um tey 200. Hetta var í árunum 1986 og aftur í 1988, tá 194 fólk búðu her.

Síðani hevur tað gingið javnt og samt aftur á, til tað í dag er farið niður um 150 - og er 146 í bygdini.

Nógv verður eisini í dag tosað um at niðurleggja teir smærru bygdaskúlarnar, og her verður í spenningi bíðað eftir lagnuni hjá Oyndarfjarðar skúla.

Tað er helst so sum onkur hevur tikið til: Fer skúlin, so fer bygdin. Men vónir verða kortini settar til at væl útgjørdi skúlin, sum bæði hýsir skúla, frítíðarskúla, barnagarði, vøggustovu og bygdarfelagnum, verður varðveittur.

*snorri@sosialurin.fo*

## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




**Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.**

**Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.**

**Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.**

**Vit hava valt at kalla rundferðina "Føroyar - norðast til sunnast". Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt - at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.**

**Góðan lesihug.**

*snorri@sosialurin.fo*